og liðfelagarnir í dag skuldu hava møguleika at vinna meistaraskapin.

- Nógv pressa hevur verið til allar venjingarnar í hesi vikuni. Hósdagin vandu vit fyri síðstu ferð, og tá vóru tað eins nógv pressufólk, sum tað plagdu at vera, tá ið vit í FCK løgdu síðstu hondina á fyrireikingarnar at spæla móti Brøndby, staðfestir Todi Jónsson, sum í gjár hevði frí.

Síðani venjingina í fyrradagin hevur hann verið lítlan rennitúr. Annars hevur hann - soleiðis sum venjarin gav boð um hósdagin - hildið seg innandurða.

- Tað ber ikki til at ganga í býnum fyri fótbóltsspráti. Venjarin hevur givið okkum boð um at halda okkum við hús og at hugsa um alt annað enn 4-3-3 og at lesa alt annað enn tað, sum pressan skrivar um okkum.

Hvussu hitar tú so upp til avgerandi dystin um NM?

- Eg eri einsamallur, so eg fari kanska ikki upp fyrrenn klokkan tíggju. Dysturin verður klokkan seks, og vit skulu møta tveir tímar frammanundan. Mær dámar væl at vera við hús í staðin fyri at fara á gistingarhús soleiðis, sum tað ofta verður gjørt, og í so máta er tað fyrimunur, at vit skulu spæla á heimavølli. Men dagurin fer við at fokusera upp á stóru uppgávuna. Tað ræður um sinniliga at vera trimmaður til avbjóðingina.

Hjá Toda kennist tað eitt sindur undarligt, at avgerandi uppgerðin um NM skal vera móti Fredrikstad, har Bora Zivkovic, sum hann kennir væl frá FCK tíðini, er í miðverjuni og harvið ein av beinleiðis mótstøðumonnunum hjá føroyinginum. Fyrsta sambandið hjá Toda til norskan fótbólt var júst Fredrikstad, men eftir at hann hevði hugsað seg um, varð sáttmáli skrivaður við felagið í Kristiansand.

- Start var oddalið tá, og eg kann ikki vera annað enn nøgdur við, at sáttmálin varð skrivaður við teir. Fredrikstad er í niðurflytingarvanda, og tí verður talan um sera torføra avbjóðing. Um vit skulu hugsa um NM, so er treytin, at vit fáa fulla úrtøku, og tað eiga vit at hava førleika at fáa. Men talan verður neyvan um nógv mál. Eg vænti eisini, at Vålerenga fer at vinna í Skien. Spurningurin er bara, hvussu nógv teir fara at vinna.

Tá ið Jákup Mikkelsen var í Molde, eydnaðist tað teimum at vinna silvurkrónur. Tað er møguleiki fyri, at Start og Todi Jónsson eisini fara at standa við silvurkrónum um hálsin í kvøld. Um tað eydnast at vinna gull, so verður tað fyrsta ferðin, at føroyskur spæleri fer at vinna NM.

### Millum teir berandi

43 ára gamli og karismatiski Start venjarin, Tom Nordlie, metir Toda Jónsson vera ein av týdningarmestu spælarunum, nú alt skal avgerast.

- Todi er avgjørt møguligur matchvinnari. Hann hevur verið átta ár í FCK, so hann veit, hvat tað snýr seg um, tá ið dystir og umfør av hesum slagnum eru á skránni. Fleiri av hinum spælarunum hava ikki hesar royndirnar, staðfestir Start venjarin.

Í norskum fjølmiðlum hevur í vikuni ikki so lítið verið gjørt við at sammeta tey bæði feløgini, sum kappast um NM - Vålerenga úr Oslo og Start úr Kristiansand. Tað er skjótt at staðfesta, at upphæddirnar, sum Vålerenga hevur goldið fyri spælararnar, og lønirnar, sum teir rinda spælarunum, eru væl hægri, enn tær eru í Start. Umstøðurnar í Vålerenga tykjast minna um tær í FCK, og tá ið Todi í norsku pressuni sammetir Start og FCK, so ger hann tað soleiðis:

- Uttan fyri vøllin er munurin sum millum Kristiansand og New York. Hetta skal kortini ikki skiljast negativt. Í FCK hava teir ráð til at keypa seg til teir spælararnar, sum teir vilja hava. Tað er ikki neyðugt hjá teimum at hugsa um, um spælararnir eru leysir av sáttmálum ella ikki. Start leitar spælarar upp, sum eru leysir av sáttmálum, og so verða spælararnir myndaðir soleiðis, sum teir vilja hava teir at vera tað. Hetta er positivt, og at tað kann røkka langt, ber støðutalvan boð um.



# Jákup heldur fram í HB

**Hósdagin skrivaðu HB og Jákup á Borg undir nýggjan tveyára sáttmála**

SÁTTMÁLI
*Jákup Mørk*

Flestu fótbóltsfeløgini kring landið eru langt síðani farin í holt við at brynja seg út til komandi kappingarár.

Ein av spælarunum, sum nakað av tosið hevur verið um, er Jákup á Borg, sum fyri tveimum árum síðani kom til HB úr B36. Og nú er so eisini greitt, at Jákup eisini tey bæði komandi árini heldur fram í HB.

Á heimsíðu síni fegnast leiðslan í HB um, at tað hevur eydnast at fáa tveyára sáttmála við HB. Ikki minst nú felagið eftir lokna kapping hevur mist tríggjar av sínum royndastu spælarunum, hevur tað alstóran týdning, at halda fast í teimum, sum verða roknaðir sum berandi spælarar. Og tað má Jákup sigast at vera. Hóast hann júst er vorðin 26 ár, so er talan um ein av drúgvastu spælarunum á føroyska landsliðnum, har hann higartil er skrásettur fyri 43 landsdystir.

Sjálvur tykist Jákup eisini vera væl nøgdur um, at alt er komið upp á pláss viðvíkjandi sáttmálanum.

### Aðrir styrkir ávegis

Tað hevur eisini ljóðað, at fleiri aðrir spælarar eru ávegis til HB, og hetta verður ikki avvíst av formanninum, Birgir Enghamar.

- Nú mistu vit jú tríggjar av teimum royndu spælarunum eftir kappingarárið. Og sjálvt um vit hava hópin av ungum og evnaríkum spælarunum, so er tað helst í meira lagi at krevja, at hesir alt fyri eitt skulu fylla holini. Tí sigur tað seg sjálvt, at vit eisini hyggja aðrar vegir, sigur formaðurin, sum tó ikki vil seta navn á, hvørjir spælarar eru ávegis.

Tað eru tó fleiri nøvn, sum seinastu tíðina hava verið sett í samband við HB. Eitt nú sigst Mortan úr Hørg at vera heilt nær felagnum. Milan Kulic sigst vera maðurin, sum skal avloysa Rúna Nolsøe, tó at Skála eisini sigst hava sýnt honum áhuga. Og endaliga hevur so eisini ljóðað, at teir báðir, Símun og Hanus Eliasen, eisini skulu koma til felagið. Men enn ber so ikki til at staðfesta, hvørt nakað er um hetta tosið, ella um talan bara er um leysasøgur.



*Dagin eftir 26 ára føðingardagin skrivaði Jákup á Borg undir tveyára sáttmála við HB*

# Nú verður Føroya Bjór Simultan

Eftir at arbeiðssteðgurin í fyrstu atløgu útsetti kappingina, verður stóra simultan-kappingin í bridge spæld nú leygardagin. Byrjað verður kl. 10.00.

Kappingin er tann størsta einstaka kappingin, ið Føroya Bridge Samband skipar fyri. Í fjørð luttóku áleið 120 spælarar, og tá gjørdust Bogi Simonsen og Jákup Hjaltalin vinnarar.

Kappingin er soleiðis skipað, at spælt verður kring alt landið um somu tíð.

Vinnarar verða fyrst funnir á teimum einkultu spælistøðinum, síðani verður ein samlaður vinnari funnin fyri alt landið.

Spælt verður í Klaksvík, Eysturoynni, Tvøroyri og í Havn.

Tilmelding á teimum ymsu spælistøðinum.

**-mørk**

# Norska Tippeligan

| | | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Start | 25 | 13 | 6 | 6 | 46 | 32 | 14 | 45 |
| 2 | Våleranga | 25 | 13 | 6 | 6 | 38 | 25 | 13 | 45 |
| 3 | Lyn Oslo | 25 | 11 | 8 | 6 | 31 | 21 | 10 | 41 |
| 4 | Lillestrøm | 25 | 12 | 5 | 8 | 35 | 29 | 6 | 41 |
| 5 | Viking | 25 | 11 | 5 | 9 | 34 | 32 | 2 | 38 |
| 6 | Brann | 25 | 10 | 6 | 9 | 42 | 31 | 11 | 36 |
| 7 | Rosenborg | 25 | 10 | 3 | 12 | 49 | 41 | 8 | 33 |
| 8 | Tromsø | 25 | 8 | 9 | 8 | 30 | 29 | 1 | 33 |
| 9 | Odd Grenland | 25 | 9 | 5 | 11 | 26 | 49 | -23 | 32 |
| 10 | HamarKam | 25 | 8 | 6 | 11 | 30 | 36 | -6 | 30 |
| 11 | Molde | 25 | 8 | 5 | 12 | 38 | 44 | -6 | 29 |
| 12 | Fredrikstad | 25 | 7 | 7 | 11 | 32 | 43 | -11 | 28 |
| 13 | Aalesund | 25 | 6 | 9 | 10 | 30 | 39 | -9 | 27 |
| 14 | Bodø/Glimt | 25 | 6 | 6 | 13 | 29 | 39 | -10 | 24 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (Start)